# Teir rúmligu skógvarnir frá Sju í Runavík

*Jústinus Leivsson*
*Eidesgaard*

Hvussu kann ein journalistur bera seg at við at skriva eitt tíðindaskriv, uttan at tað beinleiðis er ein horugrein, sum tikið verður til innan journalistafakið. Tað ber neyvan til, um tú hevur móttikið mutur og tað havi eg.

Fyri tveimum mánaðum síðani stóðu tveir fremmandir skógvar í gongini hjá okkum í Ovarugøtu 1 í Hoyvík. Eg hevði beinanvegin illgruna og hesin gruni fór beinaleið norður til Oyndarfjarðar til mína elstu systur, sum eitur Sólgerð Leivsdóttir. Hon eigur ein skógvahandil í Runavík, sum leggur serliga áherslu á at hava góðar, sterkar og eftir fótinum seymaðar skógvar.

Hon hevur róð framundir fyrr, at fáa meg at hjálpa henni við marknaðarføringini, tó at skriva tíðindaskriv, er ikki tað sum journalistar eru fegnast um. Eitt tíðindaskriv skuldi helst verið treytað av, at tú dámar tað tú skrivar um, og eg áni ikki hvussu skógvarnir hjá systir míni í Sju eru á fótunum.

Nú er elsta systir mín ein besnissað handilskvinna, og kundi hon ikki beinleiðis fáa meg at skriva um hvat hon royndir at selja, so kundi hon royna at mutra meg. Hon setti skógvarnar í gongina einaferð vit ikki vóru heima.

Har stóðu teir so í tveir dagar. Eg hugdi eftir teimum og hevði hug at ilskast, skuldi eg nú ikki sjálvur bestemma hvørjum skóm eg gekk í. Eskjan var vøkur og har var nógv at lesa innan í. Fyritøkan var umhvørvisvinarlig og nýtti bert reinar náttúruúrdráttir til sína framleiðslu. Undir iljunum var reint náttúrugummi, sum verður útvunnið úr gummitrøum. Gummitrøð kenni eg nógv til úr Singapore. Tey vuksu uttanfyri har vit búðu og eg havi ofta fingið smáu nøtirnar frá hesum trøum í høvdið. Tær eru smáa og særa ongar. Trøini stava frá Suðurameriku, men blivu smuglaði til Singapore í 19. øld av bretum, og tá mistu tey stóru gummilondini í Suðurameriku tann fongríka handilin við náttúrugummi.



*Nú hava rúmligu skógvarnir hjá Sjú í Runavík verið á fótunum í tveir mánaðir, og fyri fyrstu ferð í lívinum havi eg fingið einar skógvar í Føroyum, har pláss eisini er fyri mínum fótum, tá íð eg eri í teimum*

Leðrið er eisini av djórahúðum av óhóttum djórum. Fyritøkan letir ein part av yvirskotinum til vælgerandi endamál, barnaheim og annað, so alt í alt sær hetta út til at vera ein skilagóður framleiðari.

So royndi eg skógvarnar og gjørdist bilsin. Teir kundu eins væl verið hondseymaðir til mín fót. Her klemmaði ikki nakrastaðni. Tað kendist gott at ganga á náttúrgumminum og leðri lagaði seg skjótt eftir mínum breiðu fótum og høgu rist.

Eg havi sukursjúku og útlitini eru ikki góð, ansi eg ikki eftir. Um nøkur ár fara tærnar at detta av, og livi eg nóg leingi, so fari eg at sita í koyristóli við stumpum niður um knøðini. Læknar, sjukrasystrar og fótarøktarar messa niður yvir meg hvussu týdningarmikið tað er við góðum og rúmligum skóm, tá íð tú er diabetikari. Og tað er slett ikki lætt hjá okkum við sukursjúku at finna skógvar, sum passa til okkara fíntfølandi føtur. Standa skógvarnir heilsuligu mátini, so eru teir ofta so ljótir, at eitt verkir almindiliga uppsikt við at traðka teir undir fótum.

Systir mín, sum er stórasysturin hevur stórasystrum vant altíð hildið seg vitað hvat var gott fyri meg. Hesuferð rakti hon blett. Rúmligu skógvarnir hjá Sju í Runavík kennast væl á mínum fótum, og konufólk leggja merki til teir. Eg fái kompliment fyri mín góða smak, ikki bara frá konuni, men eisini frá øðrum á míni leið. Fótformað n‡tist ikki at verða ljótt fótformað, tað kann saktans verða vakurt og rúmligt, eins og skógvarnir frá Sju í Runavík.

## VEÐRIÐ




**Hósdagin**
Skýggjað og regn. Gul til andøvsgul av útsynningi, 3-8 m/s. Sum frálíður snarar hann í ein sunnin, og vindurin økist í andøvsgul til stívt andøvstul, 5-10 m/s. Hitin millum 4 og 8 stig.




**Fríggjadagin**
Stívt andøvsgul til hvassan vind av vesturi, 10-15 m/s. Sum frálíður snarar hann vestureftir, og vindferðin linkar til andøvsgul til strúk í vindi, 5-10 m/s. Skýggjað og regn, men sum frálíður ælavegur. Hitin millum 5 og 9 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -15 |
| Nuuk | -6 |
| Qaqortoq | -7 |
| Ammassalik | -2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 8 |
| Tromsø | -6 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -5 |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | -9 |
| Moskva | -4 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | -3 |
| Kiev | -5 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 3 |
| Madrid | 4 |
| Róm | 9 |
| Malorca | 12 |
| Athen | -- |
| Malta | 13 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 18 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 1 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í dag**
Eitt látrýst, undir 990 hPa, norðan fyri Ísland flytir seg í eina landnyrðing. Eitt annað látrýst, 1005 hPa í ein útnyrðing úr Skotlandi flytir seg norðureftir og dýpist. Tilhoyrandi hitabrúgvin ferðast framvið Føroyum í dag.




Hósnáttina ferðast ein hátrýstryggur við tilhoyrandi hitabrúgvum ferðast um Føroyar av vesturi. Seinni nærkast eittt hátrý st av vesturi.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/12 kl. 06⁰⁰– 21/12. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,2°
Minsti hiti máldur í des.: -10,5° - Mesti hiti máldur í des.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 11,0 mm – mált frá 20/12 kl. 06⁰⁰– 21/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 65,3 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

www.sosialurin.fo


## VESTFALLSKYRRINDI

15. desember Fullmáni
21 desember Mánin longst frá jørðini
23. desember Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. Des | 10.47 | 23.05 | 09.47 | 22.05 | 10.02 | 22.20 | 00.26 | 12.47 | 01.26 | 13.47 | 09.02 | 21.20 | 08.02 | 20.20 | 11.02 | 23.20 | - | 12.02 | 10.32 | 22.50 | 11.47 | - |
| 22. Des | 11.23 | 23.53 | 10.23 | 22.53 | 10.38 | 23.08 | 01.05 | 13.23 | 02.05 | 14.23 | 09.38 | 22.08 | 08.38 | 21.08 | 11.38 | - | 00.20 | 12.38 | 11.08 | 23.38 | 00.05 | 12.23 |
| 23. Des | - | 12.24 | 11.24 | 23.55 | 11.39 | - | 01.53 | 14.24 | 02.53 | 15.24 | 10.39 | 23.10 | 09.39 | 22.10 | 00.08 | 12.39 | 01.08 | 13.39 | - | 12.09 | 00.53 | 13.24 |
| 24. Des | 00.55 | 13.26 | - | 12.26 | 00.10 | 12.41 | 02.55 | 15.26 | 03.55 | 16.26 | 11.41 | 23.59 | 10.41 | 22.59 | 01.10 | 13.41 | 02.10 | 14.41 | 00.40 | 13.11 | 01.55 | 14.26 |
| 25. Des | 01.44 | 14.03 | 00.44 | 13.03 | 00.59 | 13.18 | 03.44 | 16.03 | 04.44 | 17.03 | - | 12.18 | 11.18 | 23.37 | 01.59 | 14.18 | 02.59 | 15.18 | 01.29 | 13.48 | 02.44 | 15.03 |

5 707265 100043 >